## Innflytarar trívast í Danmark

Tá talan er um annað ættarlið av muslimskum inndlytarum í Danmark halda 90 prosent, at tey hava tað betur í Danmark, enn tey høvdu havt tað, um tey búðu í tí landi, sum foreldur teirra fluttu úr. Tað sæst í einari kanning, sum danska hagstovan hevur latið gera, skrivar Politiken. Tað eldra ættarliðið er næstan líka væl nøgt við umstøðurnar í Danmark. Næstan 80 prosent av teimum siga, at tey fingu eitt betri lív við at rýma úr heimlandinum til Danmarkar. Tilsbarandi kanningar eru gjørdar í øðrum londum, og sambært Politiken eru innflytararnir í Danmark og Spania teir, sum eru best nøgdir við umstøðurnar.



## Fólkaatkvøðu um ES

Á landsfundi um vikuskiftið samtykti landsfundurin hjá íslendska flokkinum Vinstri græn, at spurningurin um íslendskan limaskap í Evropasamveldinum skal leggjast fyri fólkið at taka støðu til á einari fólkaatkvøðu. Í niðurstøðuni frá fundinum stendur, at flokkurin heldur tað vera betur fyri íslendska búskapin, at landið er uttan fyri ES. Vinstri græn fer sostatt ikki at virka fyri fólkaatkvøðu um málið, men sigur, at krevja 20 prosent av fólkinum fólkaatkvøðu um limaskap í ES, skal hon haldast. Landsfundurin umrøddi búskaparstøðuna og legði dent á at útvega arbeiðspláss og at varðveita vælferðarsamfelagið.



# Drekk heldur kranavatn

**Illgruni er um, at keypivatn kann elva til hormonellar broytingar. Tí mæla danskir myndugleikar fyribils til, at fólk heldur drekka kranavatn**

BRÚKARAMÁL
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Illgruni er um, at keypivatn kann elva til hormonellar broytingar.

Hetta vísir ein nýggj týsk kanning, almannakunngjørt í net- tíðarritinum Environmental Science and Pollution Research. Kanningin fevnir um 20 ymisk sløg av keypivatni, harav 12 vístu seg at ávirka evnini at nørast hjá sniglum.

Men í fyrsta umfari mæla týskir myndugleikarnir tó til, at kanningin verður tikin við fyrivarni. Tí enn er ógreitt, hvørji evni talan er um, og hvussu tey eru endað í vatninum. Men, síðan kanningin varð almannakunngjørd, hana danir mælt til, at vit heldur sløkkja tostan við kranavatni.

- Fólk drekka alt meira keypivatn. Tí er tað umráðandi, at brúkarin kann vera heit tryggur, sigur Thomas Breck, kunningarleiðari á danska stovninum Miljø & Sundhed, sum hevur tikið stig til, at eftirkanna týsku úrslitini.

Í fyrsta umfari mælir stovnurin tó fólki til at drekka vatnið í krananum. Hetta minkar eisini um burturkastið og um útlátið av vakstrarhúsgassi.




# Dámurnar fara til sjós

**Festligt damucruise - so fara damurnar til sjós. Á hvítusunnu skipar Synergi fyri damucruise við Norrønu**

KVINNUR
*Tíðindaskriv*

- Mannfólk duga so væl at savnast til alt møguligt, teir fara á fjall, fletta, skjóta harur, fara eftir nátum, á flot, fiska síl, hyggja eftir fótbólti, spæla tónleik, mála bátin ja, vit kundu hildið fram. Kvinnur hinvegin møtast bara sjáldan uttan børn, tað er líka bindiklubburin 14'anda hvønn dag – ofta aftan á at børnini eru løgst.

Soleiðis skrivar Synergi í tíðindaskrivi. Tey siga, at tá kvinnur savnast, er tað sum oftast í sambandi við okkurt praktiskt, sum skal ordnast, eitt nú hjálpast at til konfirmatiónir, barnafødingardagar og onnur hátíðarhald. Sum oftast eru børnini rundanum tær, tá tær eru saman. Men so verður ikki hesa hvítusunnuna. Tá fara kvinnur úr øllum landinum til sjós. Meiningin við túrinum er at geva kvinnum eitt høvi at hava tað stuttligt og rættiliga hugna sær saman uttan samstundis at ansa børnum, ordna ymiskt praktiskt, verða vertinnur ella annað – man kundi sagt tað reina sjálvforkelisli.

Smyril Line vendi sær til Synergi, sum eru vanar at skipa fyri bæði stórum veitslum, Livsstílsstevnu, fakligum tiltøkum og øðrum tiltøkum. Damurnar á Synergi hildu hetta verða eitt spennandi átak - endaliga eitt høvi hjá kvinnum at savnast um annað enn praktisk viðurskifti. Ikki minst kvinnurnar í familjuni, mammur, døtur, systrar, svigerinnur, svigerdøtur, mostrar, fastrar osfr.

Á skránni verður mangt og hvat, spennandi fyrilestrar um Enneagram, møguleiki fyri m. a. massagu, zoneterapi og meditatión, Roulette og Black Jack, spennandi second hand torg umborð, fancy damupart við lekrari 3-rættaðari menu, venjing í »maskinrúminum«, kanska sóla sær á dekkinum og ikki minst heilan leygardags shopping í longstu gongugøtu í Danmark (Esbjerg). So man ikki damurnar eisini fara at hava onkran góðan fongin heim við?

Komið verður heimaftur 2. hvítusunnudag, so tær náa eisini hvítusunnudøgurði – tær eru ikki kvinnur fyri nothing.

Meira kann lesast á www.synergi.fo